Gil. Hann giftist 19.apríl 1891 við Johanne Sophie Jensen, Annufiu, f. 6.11 1864, ættað úr Gróthúsinum. Hon doyði 29. apríl 1905, 40 ára gomul.

Hans Marius tók skiparaprógv hjá Jens Mohr í 1896. Hann førdi fleiri skip sum Dart, Sandoynna, Prince of Wales, Tjaldrið og Grace.

Í 1909 keypti hann saman við øðrum motorbátin Skøjten VA 172, sum var 11 tons til støddar og hevði 6 hk motor.

Í 1909 fóru teir til Íslands at rógva út. Teir fingu 6-8 oyru pundið av saltfiski.

Um heystið fóru teir heim aftur. Tá hevur Hans Marius við sær Halltóru Helgadóttir f. 2. mars 1888, sum í fólkateljingini fyri 1911 stendur at vera tænastugenta. Hetta man uttan iva vera sama Halltóra, sum hann giftist við. Hon hevur verið 20 ár yngri enn hann.

Í 1911 fer Hans Marius avstað aftur úr Føroyum. Tá er tað hann búsettist á Skálum og giftist aftur. Nógvir landsmenn vitjaðu hann á Skálum.

Børnini hjá honum í Føroyum vóru:

**Anna** f. 1891. Ógift. Hon flutti til Gásadals at halda hús hjá Kristoffur Jensen. Tey fingu í 1934 ein son saman, Jens. Hann doyði 14 ára gamal av roykeitran á útróðri.

**Maria Elisabeth** f. 1892. Doyði 15 ára gomul

**Jens Elias** f. 1894, gjørdist bert 5 vikur gamal

**Hans Nikłái** f. 1896. Fekk sær eftirnavnið við Gil. Var ógiftur. Var til skips og gjørdist seinni skrivari hjá Sørvágs kommunu. Hann doyði í 1973.

**Elsebeth Sofie** f. 1898, gjørdist 5 ár.

**Sámal** f. 1901. Tað var hann sum fór við pápanum til Skálar, har hann druknaði

**Bina** f. 1903 giftist til Vestmannar við Hilmari Durhuus (1901-1983), ættaður úr Garðastovu í Vestmanna. Tey fingu børnini Hanna, Anny og Hilbert.

### Ættin vitjaði eina ferð

Í ættini í Føroyum verður greitt frá, at lítið og einki samband hevur verið við Hans Marius og hansara ætt. Men einaferð fyri nógvum árum síðani komu tvey børn hansara til Føroya at vitja hálvsystrina Binu. Tey itu Sámal og Johanna, eftir øllum at døma uppkallað eftir beiggjanum og ommuni. Í Íslandi átti Hans Marius eisini dótrina Margrét, kallað Magga.

Bina greiddi hálvsystkjunum frá, at hon eftir at pápin var farin avstað, javnan fór oman á bryggjuna at vita, um pápin mundi koma við onkrum skipi.

Tey vita einki um, at Halltóra einsamøll hevu verið í Føroyum. Kanska blandar íslendska keldan við, tá hon kom heim við Hans Marius, áðrenn tey giftust.

## Sivar Højgaard: Føroyskur útróðrarmaður á Skálum

Í bókini hjá Sámal Johansen er ein frálík lýsing av Skálum frá Sivar Højgaard av Húsum. Saman við hansara frásøgn fæst ein frálík heildarmynd av hesi íslendsku bygdini, sum eisini er ein partur av føroyska samleikanum:

Vit vóru fýra í felagnum øll árini. Vit plagdu at fara við sluppum til Íslands. Oftast var tað við Sigurfarinum, sum Jói á Húsum var skipari á. Við honum fingu vit bátin og alt viðføri. Hetta var sera lagaligt, tí fóru vit við postskipi,



*Húsamenn á Skálum. Aftast er Sivar Højgaard. Sitandi eru f.v. Ólavur Johannesen, Geila Jakku og Dánjal Hansen. Frá Geila Jakku og soni hansara Jóannes finst ein sera drúgv skrivlig frásøgn um teirra lív til sjós, eisini frá Skálum. Ólavur Johannesen var pápi Jakku, sum leingi ar sýsluformaður hjá Føroya Fiskimannafelag í Norðoyggjum og Niclas, sum eitt skifti var formaður í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag.*



*Lendingin á Skálum. Ikki var tað serliga framkomið*

vórðu vit settir av á Seyðisfirði, og haðani var long leið norður til Skálar.

Á Skálum fingu vit innivist í einum skúri, sum var so stórur, at tað vóru rúm í honum til fleiri bátafeløg. Rúmið vit høvdu var um 5x5 alin. Ein lítil gongd var til at hanga klæðir í. Annars var tað sera trongligt. Ein kabúss var til at hita rúmið við, men primus høvdu vit til at matgera á. Seinni batnaðu viðurskiftini tó eitt sindur. Tá fingu vit eitt rúm afturat, sum vit brúktu til at goyma ymist í. Uppaftur seinni fingu vit komfýr, men hann var lítið matari enn kabússin.

Keypmaðurin Stefan Jónsson á Seyðisfirði átti húsini. Hann hevði eina tíð alt fiskakeyp á Skálum, og eitt árið róðu 39 bátar út hjá honum. Ein av hansara motorbátum plagdi at sigla millum Seyðisfjørðin og Skálar við allari útgerð, sum neyðugt var at brúka. Stefan hevði »Aldufelagið«, sum tók sær av øllum viðurskiftum hjá útróðrarmonnunum. Tað var nógv fólk í vinnu hjá hesum felag, bæði kvinnur og menn. Felagið lat eisini konufólk vaska okkara íbúð tvær ferðir um vikuna, uttan at hetta kostaði okkum nakað.

Vit lótu fjúrtandu krónu, sum vit vunnu, í húsaleigu. Hetta var í hvussu er minni enn á Bakkafjørðinum, har teir lótu tíggjundu hvørja krónu.

Aldufelagið átti stór hús á Skálum. Hesi hús vóru bæði krambúðarhús og íbúðarhús hjá starvsfólkunum, sum vóru har um summarið, meðan útróðurin fór fram. Um veturin stóðu húsini tóm, og tey skuldu ikki vera tespulig at koma til aftur á vári. Tað vóru



*Ikki var tað serliga høgligt á Skálum. Man nakar føroyingur vera á hesum myndum?*

nakrir ótangar á Skálum, sum um veturin gjørdu seg inn á húsini, brutu rútar o.a. Her kravdust stórar umvælingar, áðrenn húsið kundi brúkast aftur.

Aldufelagið átti eisini stór fiskahús á Skálum. Har varð fiskurin flaktur og saltaður. Tey fyrstu árini seldu vit fiskin sum ráfisk. Prísurin var um 7 oyru pundið. Tað var ikki høgur prísur, men fiskurin var nógvur. Tað var so íðiliga, vit fingu 3-4.000 pund um dagin. Seinni fóru vit at flekja og salta fiskin sjálvir. Vit seldu hann í Íslandi, og hetta loysti seg væl.

### Fingu agn á Skálum

Tær føroyslu sluppirnar, sum royndu á Eystur- og Norðlandinum seinast í 20-unum og í 30-unum brúktu sild til agn. Føroyskir útgerðarmenn bygdu frystihús á Skálum, har teir goymdu agnsild hjá sluppunum.

Íslendingar fingu kava inn í húsið um veturin, og tá sildatíðin kom, varð sild goymd í húsinum. Henda sild var ikki altíð líka gott agn, tí ofta kom hon nóg so seint í ís.

Vit fingu ofta nógva sild, sum vit seldu til frystihúsið. Tann sildin, sum vit sjálvir fingu, var betri agn, tí hon kom skjótari í ís. Tað vísti seg eisini, at tey skip, sum fingu av okkara sild, fiskaðu meir. Jú, nógv ráddi um at hava gott agn.

Ta sildina, sum vit sjálvir brúktu til agn, goymdu vit í frystihúsinum. Hetta kostaði 3 oyru fyri hvørja sild. Men vit fingu ofta meira sild, enn vit sjálvir brúktu. Avlopið seldu vit

Framhald á síðu 34